# Ungir rokktónleikarar gera innrás

**Nýggja rokktiltakið Rox 2004 dróg 400 áhoyrarar niðan í Badmintonhøllina leygarkvøldið, og fyrireikarin Karl Anton Klein sigur, at onnur tiltøk eru á veg fyri at fáa ungar tónleikarar á pall. Fríggjakvøldið gera ungir tónleikarar innrás í Mentanarhúsinum, seinni í summar gongur leiðin til Íslands, áðrenn pumpandi rokktónar vera at hoyra í Norðurlandahúsinum í heyst**



*Zink á palli í Badmintonhøllini leygarkvøldið undir stóra tiltakinum Rox 2004*
*Mynd: Eyðun MüllerThomsen*

TÓNLEIKUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Spildurnýggja rokktiltakið Rox 2004, sum manningin á Margarinfabrikkini skipaði fyri, var á fyrsta sinni hildið leygarkvøldið í Badmintonhøllini í Havn, og sambært Karl Antoni Klein fyrireikara og tónleikalærara eru teir væl nøgdir við konsertina.

– Vit byrjaðu at práta um konsertina afturi í desember mánaði, men arbeiði gerst sjálvandi meiri intenst seinasta mánaðin, sigur Karl Anton Klein. Hann heldur, at hóast nógv arbeiði krevst, er tað at skipa fyri eini konsert ikki øll verðin, og tað kann ikki nýtast sum undanførsla til vantandi live-tónleik í Føroyum.

### Yvirskot

– Fluffy Toys var fyrsti bólkurin á palli, meðan Side Effect setti punktum við einum rimmar braki. Ljóðgóðskan var góð, skiftini gingu væl, og hóast vit vóru nakað seinir at byrja konsertina, eru vit sum heild væl nøgdir, sigur Karl Anton. Hann vil fegin undirstrika, at teir 400 ungu áhoyrararnir uppførdu seg fyrimyndarliga leygarkvøldið. Hóast alt ikki er gjørt upp, mól tiltakið sambært Karl Antoni eisini runt fíggjarliga, og peningurin verður nýttur til nýggj tiltøk fyri ungar tónleikarar.

– Tað er ov lítið av føroyskum live-tónleiki, og ein av uppgávum okkara er at kunnað bjóða góðan og livandi live-tónleik til fólkið, sigur Karl Anton. Tá alt hetta er sagt, kastar hann eisini ljós viðurskifti, hann ikki var heilt nøgdur við leygarkvøldið.

– Eg má tó leggja afturat, at WC-umstøðurnar í Badmintonhøllini eru alt annað enn nøktandi. Tvey lítil WC til 400 fólk er synd at bjóða ungdómi okkara, serliga tá talan er um eina høll, sum er góðkend til 640 fólk, slær Karl Anton fast.

Rox 2004 stóð sostatt sambært honum royndina, og í summar og heyst eru nýggj tiltøk á skránni hjá Karl Antoni og teimum, sum stríðast fyri føroyska tónleikin.

### Fleiri konsertir

Karl Anton sigur, at eitt aðalendamál teirra er at geva ungum tónleikarum og nýggjum bólkum nýggjar møguleikar og avbjóðingar, og eftir øllum at døma verður nógv gjørt at náa hesum málum.

– Fríggjakvøldið verður ein minni útgáva av Rox 2004 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og tiltakið byrjar klokkan 23, greiðir Karl Anton frá. Bólkarnir á palli fríggjakvøldið verða 48 Pages, Speaker, Einkikanndiskuterastaltkann, Lamasea, Zink, og DJ Switch, og so verður ein bólkur úr Eysturoynni, sum ikki luttók á Rox 2004 við navninum Glitch eisini at hoyra.

– Umframt hetta arbeiða vit við einum størri og kanska meiri krevjandi konsert í heyst, har ætlanin er at skipa fyri rokktiltaki í Norðurlandahúsinum, og vónandi fáa vit hesar ætlanir í eina fasta legu, sigur Karl Anton.

### Ísland bíðar

Men Karl Anton Klein og aðrir fara seinni í summar eisini at geva ungum tónleikarum møguleikan at royna seg uttanfyri landoddarnar. Teir hava samskipað eina konsertferð til Íslands við nýggju havnarbólkunum Speaker og 48 Pages.

– Hetta eru ungir og evnaríkir tónleikarar, sum hava brúk fyri avbjóðingum. Tað vísir seg at vera sera torført hjá nýggjaru bólkunum at sleppa framat, og tí steðgar menning teirra ofta. Ferðin til Íslands er so eisini ein roynd at betra um hetta, sigur Karl Anton Klein.

Saman við hesum bólkum hevur Karl Anton eisini stovnað útgávufelagið Sprel Rex, og seinasta mánadag kom nýggja fløga teirra Ampaljóð á marknaðin. Spurdur, hvussu tíðarkrevjandi arbeiði hansara er fyri ungu tónleikararnar, er Karl Anton greiður.

– Tað verður helst eingin summarfrítíð í ár fyri okkara viðkomandi, sigur hann at enda flennandi.



*Søgan tykist júst verða byrjað fyri trummuspælaran í The Story Ends, sum her roynir seg frammanfyri teimum 400 áhoyrarunum leygarkvøldið*
*Mynd: Eyðun Müller Thomsen*



*Streingjatónar frá guitarspælaranum í Paradox undir Rox 2004, sum sum manningin á Margarinfabrikkini skipaði fyri. Sambært Karl Antoni Klein fyrireikara eru bæði Ísland, Mentanarhúsið og Norðurlandahúsið á skránni í næstum*
*Mynd: Eyðun Müller Thomsen*



Formaðurin í Útoyggjafelagnum:

# Tað kann tykjast vónleyst og tungt



*- Ein vælvirkandi útoyggjamenningarstova – ein skrivstova - er eitt sera avgerandi amboð í arbeiðinum at menna útoyggjarnar. Hetta noyðast vit at fáa myndugleikarnar at viðurkenna og stuðla, segði formaðurin í Útoyggjafelagnum, Óla Jákup úr Dímun*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*– Skal nakað munagott henda í málinum um oljutunnurnar, er neyðugt, at landið, kommunur, oljufeløg og møguliga SEV eru við til at loysa málið, segði Tummas Frank Joensen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**– Tað kann tykjast vónleyst og tungt at stríðast fyri at halda lív í útoyggjunum, serliga tí úrslitini ikki tykjast liggja beint um húsahornið. Men tað hevur ongantíð verið so týdningarmikið sum nú at halda fast og ikki missa takið, segði Óla Jákup úr Dímun á útoyggjafundinum í Hesti**

ÚTOYGGJAFUNDURIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Triðji aðalfundurin hjá Útoyggjafelagnum varð hildin í Bygdarstovuni í Hesti seinasta leygardag. Nógv fólk vóru komin saman, og bygdarstovan var á tremur. Fundurin valdi Abraham Mikladal til orðstýrara og Óla á Geilini til skrivara.

Formaðurin í felagnum, Óla Jákup úr Dímun, setti fundin og las formansfrágreiðingina.

Hann legði dent á týdningin, ið felagið hevur fyri at styrkja samanhaldið og samstarvið millum tey, sum búgva á útoyggj og fyri at menna útoyggjarnar.

– Tað kann tykjast vónleyst og tungt at stríðast fyri at halda lív í útoyggjunum – ikki minst, tí úrslitini ikki tykjast at liggja beint um húsahornið. Men tað hevur ongantíð verið so týdningarmikið sum nú at halda fast og ikki missa takið.

Óla Jákup vísti á, at ein vælvirkandi útoyggjamenningarstova (skrivstova) er eitt sera avgerandi amboð í hesum arbeiði.

– Hetta noyðast vit at fáa myndugleikarnar til at viðurkenna og stuðla, segði hann.

Á fundinum útgreinaði Olga Biskopstø, samskipari, tær uppgávur, sum felagið hevur arbeitt við seinasta árið.

Hon greiddi eisini frá, hvat liggur fyri framman at fremja í hesum árinum.

Olga vísti á, at felagið hevur ikki ta neyðugu arbeiðsorkuna, sum skal til, um munagóð tiltøk skulu setast í verk – útoyggjunum at gagni.

Á fundinum lýsti Tummas Frank Joensen úr Skúvoy gongdina í "oljutunnumálinum" og vísti á, hvussu trekt tað hevur gingist við at fáa loyst hetta máli.

– Eingi ítøkilig úrslit eru enn, men vónandi verður tað ikki so leingi, til okkurt munagott hendir.

Hann vísti á, at skal nakað munagott henda í hesum máli, er neyðugt, at landið, kommunur, oljufeløg og møguliga SEV gerast partar í málinum.

At enda á fundinum varð eitt skriv lagt fram, sum felagið ætlar at senda Jógvani við Keldu, landsstýrismann í innlendismálum.

Í skrivinum verður heitt á innlendismálaráðið um at geva Útoyggjafelagnum betri arbeiðsumstøður. Tað er umboðsráðið í felagnum, sum hevur tikið stig til hetta.

Á aðalfundinum varð nýggja umboðsráðið staðfest, og val var av starvsnevnd. Úrslitið gjørdist, at starvsnevndin heldur fram óbroytt, og tað sama er galdandi fyri umboðsráðið.

Sostatt heldur Óla Jákup úr Dímun fram sum formaður í Útoyggjafelagnum. Enn er ikki endaliga avgjørt, hvar næsti aðalfundur felagsins verður, men lagt er upp til, at hann verður hildin í Svínoy.

Útoyggjafelagið:

# Ein sera væl fyriskipað útoyggjastevna

**Útoyggjafelagið heldur, at stevnan í Hesti leygardagin eydnaðist sera væl**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Stevnan var framúr væl fyriskipað, og ungmannafelagið í Hesti og hestfólk eiga stóra tøkk uppiborna fyri tað. Øll kendu seg væl komnan, og umframt gestablídni var eisini góður matur og undirhald, og ein hópur av upplivingarmøguleikum. Veðrið var til vildar, og tað gjørdi eisini sítt til, at dagurin var so væl eydnaður.

Felagið sigur, at góðir møguleikar vóru at koma til og av oynni, tí umframt Teistan, sigldi eisini Norðlýsið við stevnugestum. Brimil tryggjaði, at norðoyingar sluppu út í Hest fyrrapartin og norður aftur á midnátt.

– Fleiri útferðir vóru. Ein í Koltur, ein niðan á oynna og ein gongutúrur norður á Sund. Frásagnir vóru við minnisvarðan og í kirkjuni. Á skúlaloftinum var søla av heimavirkaðum lutum.

Undirhald var fyri børnum á bryggjuni og uppi í bygdini. Og ikki at gloyma ta góðu suppuna, kókað í serstøku "fiskagrýtuni", sum var gjørd á Tórshavnar Skipasmiðju til endamálið. Tað var Birgir Enni, sum stóð fyri suppuni. Um kvøldið var dansur.

Felagið vísir á, at ein spennandi kapping var fyriskipað.

– Tað var togtogan millum útoyggjarnar. Fugloyggin fór avstað við sigrinum, men luttakararnir stríddust manniliga fyri at vinna sær heiðurin sum sterkasta lið.

Útoyggjafelagið takkar hjartaliga øllum teimum, sum fyriskipaðu og stuðlaðu tiltakinum úti í Hesti.



*Útoyggjafelagið er sera væl nøgt við fyriskipingina av útoyggjastevnuni í Hesti leygardagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*